# Varpaðu í kring

**Hóskvøldið varð alment tendrað fyri Televarpinum. Hetta hendir á samkomu í Fornminnissavninum í Hoyvík, har nýggja tøknin lýsti upp millum fornlutirnar**

FRUMSÝNING
*Orð:Heri á Rógvi*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Fornminnissavnið í Hoyvík var hóskvøldið karmur um almennu frumsýningina av Televarpinum.

Dóttirfyritøkan hjá Føroya Tele fer nú undir at bjóða fylgiveinarásir á UHF netinum.

Tað var landsstýrismaðurin í fjarskiftismálum, Bjarni Djurholm, ið við at trýsta á ein knøtt byrjaði ein nýggjan kapittul í føroysku fjarskiftisøguni.

Tróndur Djurhuus, stjóri fyri Televarpið, Andras Róin, nevndarformaður og stjóri fyri Føroya Tele hildu saman við Bjarna Djurholm røðu á hátíðarhaldinum í sambandi við fyrstu sendingarnar.



*Hóskvøldið varð tendrað fyri Televarpinum. Hátíðarhald var í Fornminnissavninum. Ein lítil framsýning við gomlum sendilutum stóð eisini millum gomlu bátarnar á Fornminnissavninum.*

Bæði Andras Róin og Bjarni Djurholm nevndu, at tað var spennandi og týdningarmikið hjá Føroya Tele at gera tílíkar fyritøkur, sum styrkja av útboðið og kunnu vera til at menna marknaðin og fyritøkurnar.

Bjarni Djurholm legði dent á, at treytin fyri, at hann hevði givið loyvi til hetta, var, at Televarpið varð rikið sum ein sjálvstøðug eind fyri seg – roknskapur og virksemi sundurskilt frá Føroya Tele.

Skipanin hjá Televarpið byggir á framkomna talgilda sendiútgerð, ið í roynd og veru ikki er roynd aðrastaðni í okkara parti av heiminum.

Tøknin kallast fyri DTT, ið stendur fyri Digital Terrestrial Television. Í stuttum ber til at siga, at við hesari tøknini verða fylgisveinarásir tiknar niður og sendar útaftur á UHF-netið umvegis eina støð. Alt verður sent tráðleyst, og neyðugt er ikki við einari parabolskál í hvørjum heimi. Kortini er neyðugt við einum móttakara – einari set-top boks – fyri at gera talgilda signalið um til myndir.

Fyrimunurin við hesari skipanini er, at tey, ið búgva í útbreiðsluøkinum, kunnu fáa talgildu myndirnar inn við einari vanligari anntennu, sum ofta er tann sama sum nýtt hevur til at taka ímóti Sjónvarpi Føroya ella møguliga Rás Tórshavn.

Tróndur Djurhuus nevndi í sínari røðu, at áhugin fyri hesari skipanini eisini er vaknaður uttanlands, og fólk fegin vilja læra av føroysku royndunum.

Upplýst verður, at íløgurnar í rundum tølum liggja um tær tíggju milliónirnar. Føroya Tele hevur innskotið tvær milliónir í eginpeningi og restin er fíggjað við lántøku.

### Fyrst í Havn

Í fyrstu atløgu sendir Televarpið bara í Havn, men ætlanin er í komandi ári at dekka størri part av landinum. Tað verður mest sannlíkt partar av Eysturoynni og Klaksvík, sum fyrst sleppa at síggja Televarpið.

Avtala er gjørd við radiodeildina hjá Føroya Tele um at fara undir tað arbeiða, sum í síðsta enda skal flyta Televarpið til aðrar oyggjar eisini. Tróndur Djurhuus sigur seg vóna, at eitt úrslit frá hesum arbeiðinum sæst í 2003.

—Sendararnir undir Varða og í Nólsoy eru tendraðir. Arbeitt verður næstu tíðina við at justera sendararnar í Nólsoy, sum tí kunnu vera eitt sindur óregluligir í fyrstuni.

Sendararnir á Sandvíkahjalla, sum m.a. senda til Kaldbaks, verða tendraðir um nakrar dagar. Televarpið fer fyrst at hækka mastrina á Sandvíkahjalla fyri at fáa eitt betri signal. Signalið sæst ikki á Norðasta Horni enn. Eisini har er neyðugt at hækka eina mastur. Televarpið kannar tó møguleikarnar fyri eini fyribilsloysn, skrivar Televarpið í tíðindaskrivi.

Somuleiðis kannar Televarpið møguleikarnar at menna sína egnum tøkni, soleiðis at pláss verður fyri fleiri rásum og fleiri tænastum.

—Vit fara at hyggja at, hvussu vit tøkiliga kunnu fáa størri bandbreidd út frá verandi kapasiteti. Hin møguleikin er so at fáa størri frekvensir, sigur Tróndur Djurhuus.

### Svartur skíggi

Tær løturnar, ið ein av rásunum hjá Televarpinum, Canal+, sendir pornografiskt tilfar verður sjónvarpsskíggin hjá fólki svartur.

Tróndur Djurhuus sigur, at fólk fara einki at síggja og einki hoyra, tá tilfarið, ið vísir meira enn gott er, kemur á skíggjan.



*Televarpið leggur eina við, at tað er lætt at fáast við móttakaran. Her er Bjarni Djurholm, ið roynir seg við kønari hjálp.*

# Kommunan fær einki gjørt

**Næsta ár skulu fólk, ið higartil hava sæð Rás Tórshavn at kalla ókeypis, gjalda á leið 4500 krónur fyri móttakara og bíligasta pakkan hjá Televarpinum. – Rás Tórshavn hevur verið eitt gott tilboð, sum tað tó ikki ber til at halda fram við at bjóða, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, ið ikki vil lova stuðul, eitt nú til pensjónistar ella feløg, nú kommunan fer at spara útreiðslur av Rás Tórshavn.**

KRINGVARP
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Rás Tórshavn er endaliga farið í søguna, og alternativið, hevur tú ikki hug at fáa tær eina parabol, er Televarpið. Men meðan Rás Tórshavn higartil hevur verið ein at kalla ókeypis tænasta hjá havnaborgarum, ið tó hava goldið eina millión um árið umvegis skattarokningina fyri rásirnar, verður rokningin frá Televarpinum fyrsta árið 4500 krónur fyri minsta pakkan, tí serligur móttakari eisini skal keypast.

- Tað er greitt, at borgararnir missa eitt gott tilboð. Rás Tórshavn hevur sent í umleið 20 ár, og eg haldi, at fólk hava verið glað fyri tilboðið. Men vit mugu ásanna, at tíðin er farin frá Rás Tórshavn. Teknikkurin er gamal, og harumframt gjørdust rásirnar, ið vit higartil hava fingið bíliga, nú sera dýrar fyri kommununa at keypa, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn.

Rás Tórshavn hevur kostað Tórshavnar Kommunu umleið eina millión um árið, og hóast kommunan nú sparir hesar pengarnar, verður neyvan talan um at lata hesa upphædd útaftur í stuðli, so fólk kunnu fáa tilboðið frá Televarpinum bíligari. Møguleikin hevur als ikki verið uppá tal, sigur Jan Christiansen.

- Eg meti hatta at vera ein sera prinsipiellan spurning. So skjótt vit gera av at lata stuðul renna vit okkum í eina breiða viftu av fólki og feløgum, ið kundu hugsað sær stuðulin. Eisini kunnu vit spyrja, hvør so skuldi fingið henda stuðul. Skuldi tað verið pensjónistar, ella barnafamiljur, ella kanska bara feløg, spyr Jan Christiansen, og vísir á, at tað er rættuliga ymiskt, hvussu fólk eru fyri fíggjarliga.

### Ein mánað afturat í Kollafirði

Tá Tórshavnar Kommuna gjørdi avtalu við Televarpið um at »yvirtaka« Rás Tórshavn, tryggjaði kommunan sær, at rásirnar hjá Televarpinum skuldu røkka út til allar borgarar í kommununi, umframt tey Inni á Fjørð í Kollafirði, ið higartil ikki hava havt møguleika at síggja Rás Tórshavn.

Men higartil røkkir sendinetið hjá Televarpinum ikki til norðastu bygdina í Tósrhavnar Kommunu, og tí er Rás Tórshavn enn at síggja í Kollafirði. Jan Christiansen sigur seg hava skilt, at tað fer at taka Televarpinum umleið ein mánað, áðrenn rásirnar hjá felagnum røkka norður á Kollafjørð, eisini til teirra, ið búgva Inni á Fjørð.





*Fólk stóðu í bíðirøð fríggjamorgunin fyri at keypa sær ein móttakara til Televarpið. Umleið 200 móttakarar fóru um diskin í teimum fimm handlunum, ið selja móttakaran, tveir teir fyrstu tímarnar fríggjadagin. Bara í Radiohandlinum í Niels Finsensgøtu, har henda myndin er tikin, høvdu tey selt 50 móttakarar, tá klokkan var farin av ellivu.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Sum heitt breyð

**Tá handlarnir lótu upp fríggjamorgunin bar fyri fyrstu ferð til at keypa móttakaran, ið krevst fyri at síggja rásirnar hjá Televarpinum. Umleið 200 móttakarar fóru um handilsdiskarnar tveir teir fyrstu tímarnar**

KRINGVARP
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Eftir móttøku hóskvøldið, har m.a.Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, alment tendraði sendaran hjá Televarpinum, stóð móttakarin, ið krevst fyri at síggja rásirnar, á handilshyllunum fríggjamorgunin.

Fyribils røkkur Televarpið bara so dánt út til allan høvuðsstaðin, og tí verða móttakarnir í fyrstu atløgu bara seldir í Havn.

Móttakarin til Televarpið fæst á hesum støðum: Damor á Argjum, Delta Elektronikktænastan í Gongini, LM Handilin við Hoyvíksvegin, Radiohandilin í N.Finsensgøtu umframt í Teledeplinum í Miðbýnum. Í heilsíðulýsingum í bløðunum er vegleiðandi prísurin fyri móttakaran settur til 2195 krónur, og allir fimm handlar hava tikið vegleiðandi prísin so bókstaviliga, at móttakarin kostar 2195 krónur hjá øllum.

### 100 um tíman

Líkt er til, at fólk ikki aftra seg við prísin á móttakaranum, og heldur ikki á prísunum fyri at síggja rásirnar, ið tey tó ikki skulu gjalda fyrr enn eftir nýggjár. Øll, ið keypa ein móttakara, skulu í minsta lagi tekna seg fyri minsta pakkan, ið kostar 179 krónur um mánaðin. Men hetta til nýggjárs ber til hjá øllum, ið keypa sær ein móttakara, at síggja allar rásirnar, eisini tær í Canal+ pakkanum og MUtv pakkanum, ókeypis.

- Hetta er næstan sum í Russlandi – fólk standa í bíðirøð fyri at keypa, segði sølumaðurin í Radiohandlinum í Niels Finsensgøtu, og legði afturat, at tey royndu at bjóða fólki kaffi og piparnøtur meðan tey bíðaðu. Har gekk sølan so væl, at um ellivu tíðina fyrrapartin fríggjadagin høvdu tey longu selt umleið 50 móttakarar. Hann væntaði seg at hava selt umleið 200 móttakarar, kanska meira, áðrenn handilin stongdi fríggjakvøldið.

Eisini hjá Delta Elektroniktænastuni, nakað longur niðri í býnum gingu móttakararnir sum heitt breyð. Har høvdu tey selt umleið 80 móttakarar, tveir teir fyrstu tímarnar fríggjamorgunin, og væntaðu at selja nakað tað sama restina av degnum. Fyri at vera eitt sindur »uppá forkant« sendi Delta fyrr í vikuni nøkrum av sínum føstu kundum bræv við tilboði um at koyra móttakaran út og seta hann upp, og higartil hava umleið 100 tikið av hesum tilboði, siga tey hjá Delta.

Triðji handilin í Miðbýnum, ið selur móttakarar, er Teledepilin hjá móðurfyritøkuni hjá Televarpinum. Um ellivu tíðina fyrrapartin vóru 35 móttakarar farnir um diskin hjá teimum, og tey væntaðu at selja yvir 100 fríggjadagin.

Hjá Damor á Argjum høvdu tey selt umleið 15 móttakarar tveir teir fyrstu tímarnar fríggjamorgunin, men har væntaðu tey nógv seinni fríggjadagin, og at sølan helst fór uppum 70. Nakað tað sama, ella umleið 20 móttakarar, vóru seldir í LM Handlinum, tá Sosialurin prátaði við tey um ellivu tíðina fríggjadagin. Eisini har væntaðu tey at selja nógvar seinni um dagin, so samlaða sølan fór at tátta í 80 móttakarar. Eisini kundi hugsast, at nógv høvdu ørindi hjá grannanum hinumegin vegin, nú tað stundar til vikuskifti, og tí eisini fingu sær ein »kassa« frá teimum í sama viðfangi, helt sølumaðurin hjá LM Handlinum fyri.

Verða sølutølini hjá teimum fimm handlunum løgd saman, so seldu teir umleið 200 móttakarar til Televarpið, tveir teir fyrstu tímarnar, móttakararnir vóru til keyps.

## Framúr væl nøgdur



*Aksel Haraldsen stjóri á Televarpinum, er sera væl nøgdur við góðu byrjanina hjá Televarpinum.*

Hetta má vera eitt tað mesta, ið ber til at selja uppá so stutta tíð. Tað sigur ein væl nøgdur Aksel Haraldsen, stjóri á Televarpinum, ið fekk 200 nýggjar kundar, tveir teir fyrstu tímarnar fríggjamorgunum.

Stjórin á Televarpinum sigur, at tey sum er hava 3000 móttakarar á goymslu. Harumframt kemur ein sending í næstu viku, og ein í aðruviku, so tilsamans fara tey at hava 5000 móttakarar klárar áðrenn jól.

- Vit vita, at umleið 6.700 fólk hava sæð Rás Tórshavn, og hesi eru so okkara marknaður í fyrstu atløgu. Men vit vita, at nú Rás Tórshavn hevur sløkt, skulu nógv gera upp við seg sjálvi, um tey ynskja at gjalda fyri at síggja útlendskar sjónvarpsrásir. Men vit hava so bundið okkum til at geva øllum, ið hava sæð Rás Tórshavn, henda møguleika, sigur Aksel Haraldsen.

Eftir nýggjár fer Televarpið at seta útgerð upp, so rásirnar eisini kunnu síggjast í stórum pørtum av Eysturoynni og í Klaksvík. Aksel Haraldsen sigur, at talan er um nýggja tøkni, og tí má Televarpið í næstum gera nakrar royndir, áðrenn sendinetið verður víðkað.

*jbh*

## Ikki okkara borð

Hædd verður ikki tikin fyri stóru økingini í sjónvarpsgjaldinum, nú síðsta hond verður løgd á fíggjarlógaruppskotið, áðrenn tað skal til 2.viðgerð í næstu viku. Tað vil m.a. siga, at í samband við skattalættan, ið samgongan hevur lovað, verður ikki lagt upp fyri, at krevjast skulu millum fimm og seks milliónir krónur meiri inn í sjónvarpsgjaldi næsta ár, sammett við í ár.

Annlis Bjarkhamar, landsstýrismaður í mentamálum, hevur valt at hækka sjónvarpsgjaldið upp í 2000 krónur, so fólk næsta ár skulu gjalda 1600 krónur til SvF, og 400 krónur í meirvirðisgjaldi til landskassan.

Hóast landsstýrismaðurin síðan hon tók avgerðina hevur verið á fundi við Fíggjarnevndina í samband við viðgerðina av fíggjarlógaruppskotinum, so fekk hækkingin av sjónvarpsgjaldinum ikki stórvegis umrøðu.

- Málið fekk ikki ta stóru umrøðu. Fólk mugu gjalda fyri tað tey fáa, og í hesum føri hevur landsstýrismaðurin í mentamálum mett tað verða neyðugt at hækka gjaldið, so Sjónvarpið fær nóg mikið av pengum, sigur Óli Breckmann, formaður í Fíggjarnevndini.

*jbh*

## Prísurin ásettur í Fraklandi

**–Prísurin fyri Canal+ pakkan fáa vit einki gjørt við. Hesin prísurin er dikteraður úr Fraklandi, og Canal+ var ikki til at vika, sigur Tróndur Djurhuus, stjóri fyri Televarpið**

TELEVARPIÐ
*Orð:Heri á Rógvi*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Burturúr øllum tí nógva, sum er skrivað um Televarpið og fylgisveinrásir í seinastuni, hevur kanska lítið verið skrivað um prísirnar. Orsøkin er tann, at allir prísirnir ikki eru vorðnir almannakunngjørdir fyrr í síðstu løtu. Prísirnir fyri Danmarks Radio hjá Televarpinum eru heldur ikki vorðnir almannakunngjørdir enn.

Prísirnir koma kanska óvart á mong. Tað vísir seg, at prísirnir hjá Televarpinum liggja væl omanfyri prísirnar hjá kappingarneytanum Canal Digital, verður sæð burtur frá meirkostnaðinum fyri útgerð.

Undan almannakunngerðingini av prísinum hevði stjórin fyri Televarpið, Tróndur Djurhuus, boðað frá, at teir illa kunda gera pakkan við Canal+ bíligari enn kappingarneytin.

Prísirnir hjá Televarpinum eru soleiðis háttaðir, at grundpakkin kostar 179 kr. um mánaðin. Hesin pakkin er neyðugur, skalt tú keypa tær rættin til at síggja aðrar rásir eisini. Tríggir aðrir pakkar eru eisini. Ein pakki er við DR1 og DR2, men prísurin fyri hendan ikki er kendur enn.

Canal+ pakkin kostar 219/mðn. Tað vil so siga, at fyri Televarpspakkan og tær fýra Canal+ rásirnar, skalt tú gjalda 398 kr. hvønn mánað.

Ein tilsvarandi pakki hjá Canal Digital kostar fyri føroyskar kundar 299 kr./mðn. Í tí pakkanum er eisini MUTV, sum kostar 59 kr. eyka frá Televarpinum.

Við øðrum orðum er prísmunurin 1.188 kr. árliga.

Men Televarpið fær einki gjørt við prísin fyri Canal+.

–Prísurin fyri Canal+ pakkan fáa vit einki gjørt við. Hesin prísurin er dikteraður úr Fraklandi, og Canal+ var ikki til at vika. Vit fingu greitt at vita, at hetta skuldi vera prísurin, sigur Tróndur Djurhuus.

Stjórin fyri Televarpið roknar við góðari undirtøku fyri tilboðnum hjá teimum. Broytingar í útboðnum kunnu væntast við tíðini, men stjórin kann ikki vísa til nakrar ítøkiligar ætlanir.